**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Standard hydrografi. Túrur nr. 1220**
**Tíðarskeið 16/5-23/5-2012**

---

**Fólk frá Havstovuni:** Bogi Hansen og Regin Kristiansen.

**Ábyrgd:** Bogi Hansen

**Endamál:** Endamálið við túrinum var at fylgja við broytingum í havinum kring Føroyar. Túrurin var ein partur av teimum regluligu kanningunum eftir teimum fýra standard skurðunum.

**Reiðskapur:** Seabird-CTD við rosettu, WP2 glúpur, ein kalibreringsfortoying og útgerð at taka fortoyingar upp við.

**Um túrin:** Vit fóru út hóskvøldið 17/5 kl. 2000. Siglt varð suður á skurð Z, har vit byrjaðu at taka CTD-støðir suður eftir Munkagrunninum. Við NWZQ (Lítlarammu) settu vit eina kalibrerings-fortoying út, sum skuldi standa uml. eitt samdøgur. Vit hildu áfram at taka CTD-støðir suður eftir skurði Z. Eisini tóku vit tríggjar streymmátara upp á hesum skurðinum. Tað gekk væl at taka upp, vit tóku ávikavist NWZA, NWZB og NWZC upp suðureftir.
Tá liðugt var á skurði Z, sigldu vit eystur á skurð E, har vit tóku tveir streymmátara upp, ávikavíst NWSC og NWSB.
Siglt varð so vestur á NWZQ, har vit fyrst tóku kalibreringsfortoyingina upp og so NWZQ (Lítlurammu).
Siglt varð so norður á Havnina, har streymmátara o.a. varð koyrt í land.
Tá liðugt var at koyra í land, fóru vit norður á NWNA, sum kom upp í øllum góðum. Vit fóru so norður eftir NWNE, men hon kom ikki upp, so vit royndu at dreggja í uml. 12 tímar, tó uttan at fáa hana upp. Vit fóru so eftir ávikavíst NWNB og NWNG, sum komu upp í øllum góðum. Haðani sigldu vit norður á 64°30N og tóku skurð N suðureftir.
Tá støð N1 var tikin, sigldu vit vestur í Bankarennuna, har vit tóku mátararnar upp, fyrst NWFB og so NWFC, so var byrjað at taka skurð V frá Bankanum og inn móti Trøllhøvda. Millum støðirnar V3 og V1 tóku vit tættari støðir, fimm eykastøðir millum hvørja.
Tá liðugt var, sigldu vit á Havnina.
Alt riggaði, sum tað skuldi, og alt gekk væl.
Vit vóru aftur á Havnini mikumorgunin 23/5 kl. 0430.

**Prøvataking:** Við Seabird CTD-ini tóku vit 50 støðir og saltprøvar á øllum. Við WP2 glúpinum tóku vit 24 støðir. Vit tóku 11 ADCP-ir (streymmátara) upp. Ein kalibrerings fortoying sett út og tikin upp.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Saltprøvarnir eru analyseraðir.

**Viðmerkingar:** NWNE kom ikki upp, royndu at dreggja, men uttan úrslit.

6-9-2012
Regin Kristiansen




Kósir og støðir á túri 1220